# Fáa ikki útflutt feskan fisk

**Nú tað ikki ber til at avskipa feskfisk mánakvøld síðani flutningsfeløgini hava niðurlagt hesa tænastu er støðan sambært Føroya Fiskasølu ótolandi – samstundis eru nýggir aktørar á veg inn á flutningsmarknaðin.**



Mynd: Fiskur
*Sambært fiskasøluni er tað ein ótolandi støða, at feskur fiskur ikki kann sendast av landinum meira enn eina ferð um vikuna*

ÚTFLUTNINGUR
*Búi Tyril / PRnewsMedia.com*

Hóast tað ongantíð hevur verið so stórur kapasitetur á flutningsmarknaðinum millum Føroyar og útheimin sum nú, so er kreppa íkomin millum útflytarar av feskum fiski síðani flutningsfeløgini hava lagt niður túrarnar mánakvøld til Skotlands. Alt bendir á at fiskaútflytarar kunnu ikki liva við hesum skerjingum í atgongdini til marknaðirnar og trýstið er stórt á flutningsfeløgini um at taka uppaftur tær niðurløgdu tænasturnar.

– Hetta her kunnu vit snøgt sagt ikki liva við, sigur Árni Arge, stjóri á Føroya Fiskasølu.

– Útflutningurin av feskum fiski er grundleggjandi fyri okkara virksemi; talan er jú um feska matvøru og hetta krevur í minsta lagi tvær avskipingar, um ikki tríggjar, um vikuna.

Samstundis er kappingin um farmaflutnings marknaðin harðari enn nakrantíð. Skipafelagið Føroyar, sum hevði eina avskiping mánakvøld, fekk uttan iva hitan at kenna frá Smyril Line og legði hesa tænastu niður nakað aftan á at nýggja Norrøna kom upp í leikin. Nú um ársskiftið hevur Smyril Line eisini lagt niður sína mótsvarandi tænastu og eftir standa útflytararnir av feskfiski sum kánus.

– Vit hava noyðst at leggja nakað um í rutunum hjá okkum, segði Jóhannes á Váli, fíggjarstjóri á Smyril Line.

– Mánadagsleiðin til Skotlands var ikki nóg lønsom og samstundis hava vit fingið integrerað Seyðisfjörðin betur alt árið.

Útlitini í alivinnuni hava eisini ávirkað, viðgongur Jóhannes á Váli.

– Við atliti til støðuna í alivinnuni so duga vit at síggja at útlutningurin av laksi kemur at vera munandi minni nú enn hann hevur verið; hetta er eisini ein partur av okkara roknistykki.

### Vit finna eina loysn

Fiskasølan vónar at Skipafelagið ella Smyril Line fer at taka uppaftur sína rutu mánakvøld, men er samstundis til reiðar at taka av tilboðum frá øðrum. Og okkurt er eftir øllum at døma við at henda.

Eitt er at Samskip eru í ferð við at starta eina nýggja rutu millum Eysturlandið, Immingham og Rotterdam, har Tórshavn sum liggur mitt á leiðini eisini verður tikin við. Enn er tó einki sum bendir á at hetta fer at hjálpa hvat viðvíkur spreiðing av avskipingum í vikuni.

Síðani ljóðar eisini at ein annar íslendingur hesa tíðina hevur verið í kontakt við vinnuna fyri at fáa eitt skip í sigling millum Tvøroyri og Scrabster.

Eitt triðja evni hevur eisini ljóðað sambært Fiskasøluni.

– Fáa vit ikki Skipafelagið ella Smyril Line at taka uppaftur mánadags rutuna ella okkurt mótsvarandi so finna vit aðrar møguleikar, segði Árni Arge.

– Vit ivast ikki í at onkur loysn verður funnin, legði hann afturat.

– Alt annað er heilt einfalt ikki til at liva við.

## Umhugsa at taka uppaftur avskiping mánakvøld

Síðani fiskaútflytarar eru komnir í kreppu aftan á at Smyril Line um ársskiftið legði niður sína sigling mánakvøld til Scrabster, umhugsar Skipafelagið Føroyar at taka upp aftur sína avskiping mánakvøld. Hendan tænasta varð løgd niður nakað aftan á at nýggja Norröna kom inn á marknaðin.

– Eg kann einki siga við vissu og kann tí heldur einki lova, sigur Michael Mikkelsen, leiðari av operativu eildini hjá Skipafelagnum Føroyar.

– Men eg kann vátta at vit umhugsa støðuna í løtuni og kanna møguleikar og fyritreytir.

**-bt**

Hvussu eitur tað á føroyskum?

# Nýggj føroysk yrkisorðabók

FØROYSKA MÁLNEVNDIN
*Marius Staksberg, skrivari*

Henda spurning munnu vit mangan hava hoyrt frá føroyingum. Hvussu ber tað til, at føroyingar spyrja aðrar føroyingar henda spurning? Jóhs. av Skarði hevur eitt svar: "Málstøðan í Føroyum er tann, at mong orð, sum vanliga verða nýtt manna millum, hava ikki fingið innivist í bókamáli. Tey hava, heilt frá tí at áhugin fyri málinum vaknaði, og farið varð rættiliga undir at arbeiða við tí, verið hildin at vera óføroysk, tó at fólk yvirhøvur nýttu tey. Føroyingar hava so í málstrevi sínum alla tíðina verið tað, vit kunnu kalla málreinsarar" (inngangur til Do-fø. orðabókina 1961).

Málrøktin í Føroyum hevur eisini umfatað yrkisbókmentir, soleiðis at skilja at fakfólk hava arbeitt við tí partinum av málinum, sum hevur við teirra yrki at gera. Henda siðvenjan er yvir hundrað ára gomul. Vit mugu viðurkenna, at arbeiðið at menna yrkismálið hevur kanska ongantíð verið so átrokandi sum í dag, nú alheimsgerðin av álvara er farin at gera um seg. Vit kenna nøkur av úrslitunum av alheimsgerðini, t.d. at tað enska málið breiðir seg kring allan knøttin og leggur seg á øki, har tað fyrr ikki hoyrdi heima. Vit skulu ikki ræðast enskt, tvørturímóti. Vit eiga at læra okkum tað so væl sum til ber. Men harumframt eiga vit at læra okkum føroyskt so væl sum til ber. Føroyskt livir eina tilvera saman við øðrum málum, mest enskum og donskum. Alneyðugt er at menna føroyskt, skal tað ikki verða kollrent av fremmandamálum. Her má miðvíst arbeiði gerast við at víðka ræsurnar fyri føroyskum og menna tað á øllum økjum. Hvussu gera vit tað? Tað gerst m.a. við, at fakfólk - saman við málfólki - seta seg niður og spyrja seg sjálv: Hvørjum orðum hava vit brúk fyri, tá ið vit skulu tosa um okkara yrki mótvegis almenninginum? Takið verður so í teimum førum, har einki føroyskt orð er tøkt, at fáa tað til vega á onkun hátt.

Mong munnu kenna navnið Jeffrei Henriksen. Hann var í mong ár føroysklærari á læraraskúlanum og limur í málnevndini. Hann hevur verið sera íðin á tí málsliga økinum. Hevur givið nógvar bøkur út millum ár og dag. Hann hevur skrivað eina nýggja yrkisorðabók við orðum innan fyri mál- og bókmentaøkið. Útgevari er Føroyska málnevndin. Hetta er triðja og nógv tann størsta bókin, sum málnevndin gevur út. Tær báðar undanfarnu eru Fólkanøvn og Nøkur teldorð. Harumframt hevur málnevndin saman við Føroya oljuídnaðarbólki, Oljumálaráðnum og Føroyamálsdeildini gjørt ein oljuorðalista, sum ikki er útgivin sum bók, men liggur á heimasíðuni hjá málnevndini.

Hetta man vera tann størsta yrkisorðabókin, vit eiga á føroyskum. Hon er skipað í tveir høvuðspartar. Í øðrum partinum verður víst frá tí fremmanda orðinum til tað samsvarandi føroyska, og í øðrum partinum - høvuðspartinum - standa tey føroysku orðini sum leitorð við eini tilvísing til tað samsvarandi fremmanda orðið. Eitt, sum ger hesa bókina virðismikla er, at hugtøkini verða skilmarkað (definerað), og at dømi ofta eru við, sum vísa orðið í brúki. Eitt av endamálunum við orðabókini er at gera vart við tey føroysku orðini, sum vit eiga á hesum økjum. Men ikki minni týdningarmikið er eitt endamálið at fáa í lag eina eintýdda málnýtslu, tá ið vit tosa um mál- og bókmentafrøði. Yrkisorðabókafrøði hevur sum fremsta endamál at normera málnýtsluna á tí einstaka økinum, og fyrsta boð er: eitt hugtak - eitt orð. Henda hugmyndin byggir á tað sjónarmið, at tá slepst undan miskiljingum.

Bókin er ætlað fólki, sum arbeiðir innan mál- og bókmentaøkið, t.e. fyrst og fremst innan skúlagátt, bæði lærarum og næmingum. Bókin kann nýtast á øllum skúlastigum. Tað hevur týdning, at t.d. føroysklærarar í barnaskúlanum nýta bókina, soleiðis at tá ið næmingarnir koma upp í framhaldsdeild, miðnámsskúla og fróðskaparsetur, kenna teir hugtøkini við teimum føroysku orðunum. Bókin er eisini hent hjá øðrum lesandi, ikki minst á læraraskúlanum, og hon eigur at vera ómissandi hjá teimum, sum hava føroyskt sum linjulærugrein.

Orðabøkur líða allar undir tí vansa, at av tí at málið alla tíðina er í menning, eru tær meira ella minni ov gamlar longu tann dagin, tær koma út. Hetta er tekin um góða heilsustøðu hjá málinum. Innan mál- og bókmentaøki verður nógv granskað, og tí koma alla tíðina nýggj hugtøk og nýggj orð fram. Henda bókin inniheldur meginpartin av orðatilfarinum, sum er at finna í føroyskum bókum og ritum um hesi evni. Hvussu eitur tað? Ja, tað eigur henda bókin at geva tær svar uppá.

Bókin er 269 síður til longdar og kostar 200 kr. í bókabúðunum.

Føroyska málnevndin
Málstovan
V.U. Hammershaimbsgøtu 16
FR-100 Tórshavn
Tlf. 312397
Faks 352521
T-postur mariuss@setur.fo
Heimasíðan
http://www.fmn.fo




























